

www.oljan.fo

**Jan Müller** 11 - 02 - 2013

# Norsk oljuvinna tørvar 11.300 fólk

Vakstrarútlitini í norsku oljuvinnuni eru ovurstór, og tað er tørvurin á arbeiðsmegi eisini. Norska arbeiðsávísingin NAV, hevur júst gjørt eina kanning, sum vísir, at norskar oljuvinnufyritøkur hava tørv á 11.300 fólkum til størv í ídnaðinum. Tað er tó ikki bara verkfrøðingar brúk er fyri men til øll tey mongu stuðulsarbeiðini, ið skulu til fyri at fullføra stóru oljuverkætlanirnar. Eitt nú innan búskap, HR, innkeyp og logistik skriva Shippingwatch og Offshore.no. Norska oljuvinnan er í stórum vøkstri, sum hevur við sær stóran eftirspurning eftir arbeiðsmegi. Her listin yvir leysu størvini (á norskum) - Andre ingeniører 2000? Svejsere 1250 ?Ingeniører (petroleum og metallurgi) 1150 ? Industrimekanikere 850 ? Elektrikere 800 ? Bygningsingeniører 750 ? Elektroingeniører 700 ? Geologer og geofysikere 400 ?Civilingeniører (geofag, petroleum, metallurgi) 400 ? Programvareudviklere 400 ? Maskiningeniører 350 ? Driftsteknikere, IKT 300 ? Pladearbejdere 300 ? Skibsmaskinister 250 ? Dæksofficerer og lodser 250 ? Netværks- og systemteknikere 200 ? Boreoperatører 200 ? IKT-ledere 100 ? Civilingeniører (byg) 100 ? Civilingeniører (maskin) 100 ? Operatører, metalfladebehandling 100 ? Civilingeniører (kemi) 100 ? Kemiingeniører 50 ? Tekniske tegnere 50 ? Arbejdsledere, industri 50 ? Automatikere 50 ? Dykkere 50 ? Eisini í donsku oljuvinnuni er tørvur á fólki. Í dag arbeiða hundraðtals føroyingar í norsku olju- og frálandavinnuni.